# DEMENSUR – hvat so?



klaksvíkar kommuna



# Hvat er demensur?

Demens er felagsheiti fyri fleiri ymiskar heilasjúkur, sum hava við sær broytingar í gerandisdegnum, bæði hjá tí sjúka og hjá teimum avvarðandi. Sjúkugongdin er sera ymisk, men støðan broytist líðandi, tí hava familjurnar aloftast tørv á støðugum stuðli í mun til skiftandi avbjóðingar.

Hetta er nøkur vanlig tekin til demens:

- Ofta versnar stutttíðarminni
- Evnini at hugsavna seg vikna
- Evnini at finna veg vikna
- Evnini at málbera seg kunnu ávirkast
- Persónmenska, hýrur og atburður kunnu broytast



# Illgruni um demens

Tað er umráðandi at søkja sær hjálp í góðari tíð, tá ein hevur illgruna um demenssjúku, so viðgerð og stuðul kunnu skipast á bestan hátt. Um ein hevur havt eyðkennir, ið geva illgruna um demessjúku, longri enn eitt hálvt ár, eigur ein at fara til kommunulækna, sum síðani ger ymiskar kanningar. Endamálið við kanningunum er at staðfesta, um talan er um demenssjúku, ella um aðrar orsøkir kunnu vera til, at ein hevur eyðkennir, ið minna um demens. Um hesar kanningar styrkja illgrunan um, at talan er um demenssjúku, verður ein vístur til Demensklinikkina á Landssjúkrahúsinum til nærri kanningar og sjúkuavgerð.

# Tá sjúkan er staðfest

Demens er ein sjúka, sum tað ber til at liva leingi og væl við. Hóast hetta síggja vit ofta, at menniskju, ið hava fingið staðfest eina demenssjúku, taka seg burtur úr virkna gerandislívinum, tí tey óttast at møta øðrum, tá t.d. minnið er farið at bila. Klaksvíkar kommuna hevur sett sær fyri, at Klaksvík skal vera ein býur, har tað er gott at vera, hóast demenssjúku – ein demensvinarligur býur. Eitt demensvinarligt samfelag er eyðkent við opinleika, stórari vitan um demens og lættari atgongd til stuðul, kunning, vegleiðing, ráðgeving og undirvísing um demens.

Tá ein hevur fingið staðfest eina demenssjúku, eru ofta nógvir spurningar hjá allari familjuni at taka støðu til, og tá er gott at hava onkran at venda sær til. Í Norðoyggjum eru góðir møguleikar at fáa stuðul og vegleiðing í hesum spurningum á Búðatrøð.



# Búðatrøð



Búðatrøð er dagtilhald fyri borgarar í Norðoyggjum, sum hava fingið eina demenssjúku. Endamálið er m.a. við rættari viðgerð og hjálp at stuðla undir ein skipaðan, innihaldsríkan gerandisdag, ið er merktur av lívsgleði og trivnaði, hóast sjúku. Hetta verður lagt til rættis við virksemi, ið gevur meining fyri tann einstaka, bæði inni á Búðatrøð og uttanfyri – í býnum og aðra staðni. Búðatrøð húsast í Heiminum við Vágna – í norðara enda, á niðaru hæddini. Búðatrøð hevur egna inngongd.

Á Búðatrøð starvast heilsustarvsfólk við serkunnleika innan demensøkið.

Umframt dagtilhald veita starvsfólkini á Búðatrøð stuðul, kunning, vegleiðing, ráðgeving og undirvísing í spurningum um demens. Øll í Norðoyggjum kunnu venda sær beinleiðis til hesa tænastu á:

Demensur er ikki eitt vanligt ellisbrek, men ein sjúka, ið krevur viðgerð og stuðul.

**Tlf. 793450 ella 789070, yrkadagar millum kl. 10 og 15**

Tænastan fevnir breitt, og allir spurningar um demens eru viðkomandi, antin tað snýr seg um ein illgruna, ella tá sjúkan longu er staðfest. Á Búðatrøð hava tey drúgvar royndir at hjálpa familjum, har demenssjúka er komin inn. Starvsfólkini vilja eisini fegin koma út á skúlar og arbeiðspláss at greiða frá, hvussu vit best møta menniskjum, sum hava fingið demens, so tey framhaldandi kunnu vera virkin í samfelagnum og á arbeiðsmarknaðinum.

Menniskju við demenssjúkum siga, at hugburðurin og atferðin hjá fólki tey møta í tí dagliga, ger størsta munin, hvørt eitt samfelag kann sigast at vera demensvinarligt ella ikki. Vit kenna okkum ofta hjálparleys og óttafull, tá vit møta menniskjum við demensi, tí okkum vantar vitan og innlit. Hetta kann hava við sær, at borgarar við demensi kenna seg avskorin og stigmatiseruð. Klaksvíkar kommuna fer tí áhaldandi at arbeiða við átøkum, sum skapa størri vitan og tilvitan um, hvussu vit møta borgarum, sum hava fingið eina demenssjúku, og teirra familjum.





# Nærri kunning

Tað finst nógv kunnandi tilfar um demens, her eru nakrar tilvísingar:

www.alzheimer.fo

www.alzheimer.dk

www.videnscenterfordemens.dk

NORĐOYA
BÚ- OG HEIMATÆNASTA